Føroyar-Saaremaa 3-2 (25-13, 15-25, 21-25, 25-23, 15-9):

# Hat-trick til kvinnurnar

**Aftur hesa ferð skuldu fimm sett til, og aftur hesa ferð megnaðu føroysku flogbóltskvinnurnar at endurvinna gullmerkið á oyggjaleikunum**

FLOGBÓLTUR
*Álvur/Jákup*



*Føroysku kvinnurnar vóru ovurfegnar eftir sigurin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Guernsey:** Føroysku kvinnurnar eru drotningarnar innan flogbóltin á oyggjaleikunum. Hetta varð enn einaferð staðfest, tá finaludysturin móti Saaremma var á skránni fríggjadagin.

Sigurin hesa ferð kom tó ikki heilt so lætt, sum hann kom í hinum dystunum, sum Føroyar leiktu á Guernsey, og kanska var stóri trupulleikin hjá okkara liði, at mótstøðan hevði verið ov veik fram til finaluna.

### Mest sum ov

Ikki minst tóktist hetta koma til sjóndar eftir fyrsta settið fríggjadagin. Í hálvfinaluni móti Álandi høvdu okkara verið dekan ov seinar úr startblokkunum, og tær tóktust uppsettar uppá, at hetta so ikki skuldi henda aftur. Frá fyrsta bóltinum riggaði nærum alt á føroyska liðnum, og við nøkrum dundrandi bóltum frá Helen á Lakjuni var sjógvur alt fyri eitt lagdur ímillum liðini.

Kanska var lætti sigurin hetta fyrsta settið viðvirkandi til, at okkara nú settu ferðina niður. Við eitt sindur minni av trýsti fekk Saaremaa nú eisini sínar móttøkur upp á pláss, og hetta var sum at rætta einum ávísum harra lítlafingurin. Snøgt sagt, so vildi einki bera til hjá okkara nú, og tað tóktist vera fullkomuliga líka mikið, hvørjar variantar okkara brúktu til álopið, so stóð mótstøðublokkurin altíð har, sum hann ikki skuldi standa.

### Reistust aftur

Saaremma tók bæði næsta og triðja settið, og so stóð av álvara á hjá okkum. Men tað var so eisini júst her, at drúgvu royndirnar á liðnum komu til sjóndar. Tær noktaðu fullkomuliga at geva seg yvir, og miðskeiðis í settinum kom so aftur gongd á. Saaremma hevði tá eina 12-6 leiðslu, og kanska vóru nervar farnir at gera um seg, men tað var so ikki okkara megin netið. Tina Jacobsen servaði átta bóltar á rað, og tó at Saaremaa royndi at reisast aftur, so var greitt, at sjálvsálit teirra hevði fingið eitt ordiligt knekk. Gudrid Nolsøe fór nú eisini at sýna, hví hon av mongum verður mett sum vandamesti føroyski álopsleikarin. Saaremaa royndi at koma aftur, men hóast Gudrid kiksaði við fyrsta settbóltinum, so var hetta ikki nóg mikið.

Og í fimta settinum stóð greitt, at sjálvsálitið var fokið. Fram til hálvt settið gekk javnt á, men tá tað fór at standa á, var eingin ivi. Uttan nakað hóvasták tóku okkara nú fleiri bóltar á rað, og við støðuna 14-8 var nú bert at bíða, til seinasti bólturin varð vunnin. Tað varð hann eisini, og so kundi gullveitslan byrja. Reint hat-trick til føroysku kvinnurnar, sum enn einaferð sýndu, at tær eru gyltar.

# Royndirnar avgerandi

**Margit Joensen ivaðist ikki í, at tað vóru drúgvu royndirnar á føroyska liðnum, sum avgjørdu dystin**

SAMRØÐA
*Álvur/Jákup*

**Guernsey:** Tað var sjálvandi ein fegin Margit Joensen, sum eftir finaludystin kundi staðfesta, at Føroyar nú triðju ferð á rað høvdu tryggjað sær gull í kvinnuflogbólti.

- Tíbetur gekk hatta hjá okkum, men hann har sá nóg so svart út eina løtu. Vit blivu nakað nervøsar, men tá vit so komu ígongd aftur, so gekk tað.

- Tað vóru heilt víst royndirnar hjá okkum, sum komu til góðar, tá vit vóru undir trýsti. Hjá mær hevði tað í øllum førum nógv at siga, at Marjun og eg hava spælt so nógv saman. Eg veit akkurát, hvar hon vil hava bóltarnar, og so kundu vit fáa gongd aftur á álopsspælið. Og so telir tað sjálvandi við, at Gudrid so eisini kom ígongd. Tað tók sína tíð, men tá ferð kom á, so var hon avgerandi fyri, at tað eydnaðist okkum at vinna.

Og um liðið sjálvt, so hevði Margit bara rósur at bera.

- Vit hava eitt gott lið. Har eru einar tvær, sum resta í frá seinastu leikunum, men eitt nú hevur Tina veruliga spælt seg upp. Og tær ungu, sum nú eru komnar, hava gjørt tað fantastiska flott. Hetta er bara deiligt, segði Margit Joensen at enda.



*Margit Joensen úr Mjølni metir, at royndirnar komu føroyska liðnum til góðar*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Seinastu heiðursmerkini í hús

**Fríggjadagin vóru tær bundnu kappingarnar í fimleiki í lopi um hest og á gólvi. Menninir megnaðu enn einaferð at hála nøkur heiðursmerki við til hús, meðan kvinnurnar heldur ikki hesuferð fingu nakað, ið líktist einum heiðursmerki, við í kuffertið**

FIMLEIKUR
*Álvur/Ingrid*



*Høgni R. Øster fekk fríggjadagin eina silvur og eina bronsu í fimleiki. Helgi Winther Olsen fekk eina silvur*

**Guernsey:** Fríggjadagin vóru tær seinastu kappingarnar sendar av bakkastokki, og millum tær ítróttargreinirnar, ið endaði tá var fimleikurin. Tá varð kappast í bundnum uppgávum á gólvi og í lopi um hest.

Fyrrapartin var kappingin fyri kvinnurnar, og hon gekk ikki so væl. Sjálvt um stigini vóru rættiliga nógv, so gav hetta ongantíð meira enn eitt sætta pláss.

Best hjá kvinnunum kláraði Anita Knudsen seg. Stigini verða samantald aftaná báðar kappingarnar, og endaði Anita har á einum níggjunda plássi, sum tann fremsta føroyska kvinnan.

Á gólvi endaði Anita é inum sætta plássi við 9,1 stigum, og var hon har fremst av teimum føroysku. Anna Hansen endaði á einum 12. plássi við 9,35 í lopi um hest, og var Anna tá tann fremst av føroyingunum.

### Menninir

Hjá monnunum gekk heldur betri. Teirra kapping var seinnapartin fríggjadagin, og var tað eisini eitt gott punktum fyri føroyska fimleikin á oyggjaleikunum.

Á gólvi fekk Høgni R. Øster silvur. Hann hevur annars næstan ikki verið við í kappingunum hesar oyggjaleikirnar. Mikudagin kappaðist hann í rekk, har tað ikki gekk rættiliga eftir vild. Fríggjadagin vildi tó betri til, og hann fekk eitt annaðpláss við stigunum 9,1. Hinir føroysku menninir gjørdust nummar 4, 5, 9 og 10 á gólvi.

Í lopi um hest fekk Helgi Winther Olsen eitt annað pláss við 9,8 stigum.

Fyri alt samanlagt endaði Høgni R. Øster á einum triðja plássi og ognaði sær sostatt bronsuna.

Helgi Winther Olsen hevði annars trý gull at verja í hesum kappingunum, men væntaði hann longu áðrenn tær byrjaðu, at tað fór hann ikki at klára.



## UTTAN ÚR HEIMI

# USA og Bretland snaraðu kjarnorkufrágreiðing

**Fyri einum ári síðani sendi amerikanska stjórnin ein fyrrverandi sendiharra til afrikanska landið Niger at kanna, um Irak hevði fingið uran haðani. Men tá upplýsingarnar vórðu nýttar, samsvaraðu tær ikki við frágreiðingina hjá sendiharranum**

HÓPOYÐINGARVÁPN
*Árni Joensen*

Joseph C. Wilson var amerikanskur sendiharri í afrikanska landinum Gabon frá 1992 til 1995, og harafturat hevði hann ofta verið í Afrika í sjeytiárunum sum amerikanskur diplomatur. Hann var tí tann rætti maðurin til uppgávuna, tá amerikanska stjórnin fyri einum ári síðani vildi hava at vita, um hald var í tíðindunum um, at stýrið hjá Saddam Hussein hevði keypt uran úr Niger, so irakski einaræðisharrin kundi gera kjarnorkuvápn.

Joseph C. Wilson fór til Niger eftir boðum frá CIA, men fann einki prógv fyri, at Irak hevði fingið uran haðani. Tvørturímóti vísti hann í sínari frágreiðing á, at eftirlitið við nigersku námsvinnuni er sera gott. Í fyrra lagi eru tað evropeisk feløg, sum standa fyri vinnuni, og í øðrum lagi hevur altjóða kjarnorkustovnurin eftirlit við øllum virkseminum.

Í einari grein í The New York Times um vikuskiftið skrivar fyrrverandi sendiharrin, at hann fekk ein hvøkk, tá hann í september í fjør hoyrdi bæði amerikansku og bretsku stjórnina siga, at Irak hevði fingið uran úr Niger, og at Irak tí var ein hóttan ímóti heimsfriðinum.

Í januar í ár endurtók George W. Bush, forseti skuldsetingina ímóti Irak og Niger, og so seint sum í mars segði Dick Cheney, varaforseti, tað sama.

- Er tað so, at upplýsingar mínar vórðu lagdar til viks, tí tær samsvaraðu ikki við mynd, sum summi frammanundan høvdu gjørt sær av Irak, so er rímiligt at siga, at vit byrjaðu hetta kríggj undir følskum fyritreytum, skrivar Joseph C. Wilson í The New York Times.

# Fox fekk frammaná

Meksikanski forsetin, Vincente Fox, brosaði, tá hann sunnudagin greiddi atkvøðu á tjóðartingsvalinum, men aftan á valið var einki bros at síggja, tí veljararnir góvu forsetanum ein frammaná.

Fox hevði vónað, at flokkur hansara, PAN, fór at fáa meiriluta til at reka tann ætlaða politkkkin, men flokkurin misti tvørturímóti 44 tinglimir. Samstundis fekk andstøðuflokkurin, PRI, størri undirtøku enn stjórnarflokkurin.



# Ætlaðu at skjóta næmingar og tilvildarlig fólk

**Sunnukvøldið tók løgreglan í New Jersey í USA tríggjar vápnaðar unglingar, sum eftir øllum at døma ætlaðu at leypa á ein skúla**

USA
*Árni Joensen*

Teir tríggir unglingarnir, sum eru 14, 15 og 18 ára gamlir, vórðu tiknir, tá teir royndu at stjala ein bil.

Løgreglan sigur, at teir tríggir høvdu latið seg í síðan frakka, og at teir hóttu ein bilførara við vápnum, men at tað eydnaðist bilføraranum at sleppa til rýmingar. Løtu seinni kom løgreglan á staðið og tók teir tríggjar.

Tilburðurin var beint uttan fyri ein ungdómsskúla, og sambært tíðindastovuni AP hava teir tríggir greitt løgregluni frá, at teir ætlaðu sær at drepa tríggjar næmingar á skúlanum. Síðani ætlaðu teir at skjóta eftir fólki, sum av tilvild komu fram við skúlanum.

Løgreglan sigur, at teir tríggir unglingarnir høvdu tvær riflur, eina høglbyrsu, tvær skammbyrsur, knívar og 2.000 patrónir.

## Ferðafólk stjala alifisk

Nógvir norskir alarar hava trupulleikar av fremmandum ferðafólkum, sum fiska við tráðu í aliringunum. Í fjør vórðu tveir fremmandir ferðamenn tiknir á bóli, meðan teir fiskaðu í einum aliringi í Halsa, og trupulleikin er tann sami í ár.

Arve Slettvåg í fiskimálastýrinum sigur við NRK, at feløg, sum leiga fremmandafólki bátar, eiga at kunna gestirnar um, at tað er ólógligt at fiska í aliringum. Í Magellan Camping, sum er eitt tað best umtókta tjaldingarstaðið í Noregi, siga tey, at har kunna tey øll ferðafólkini um, at tað er ólógligt at fiska í og tætt við aliringarnar.

Leiðslan á Magellan Camping hevur fingið gott samstarv við alifeløgini har á leiðini, og hetta hevur víst seg at rigga væl, siga tey. Men tílíkt samstarv er ikki allastaðni, og nógvir fremmandir ferðamenn hava tí javnan alifisk á tjaldborðinum. Onnur ár hevur tað eisini víst seg, at nógvir ferðamenn hava fitt av alifiski við sær, tá teir fara heimaftur aftan á at hava hildið summarfrí í Noregi.

## Keða seg í sjóverjuni

Nógvir av teimum ungu monnunum, sum arbeiða í donsku sjóverjuni, hava so lítið at gera, at teir keða seg.

Á flotastøðini í Korsør er trupulleikin so stórur, at leiðslan kennir seg noydda at lata menninar fara til hús í upp til tríggjar mánaðir við fullari løn, tí har er einki at gera. Á støðini í Frederikshavn er sama skilið. Leiðslan har nevnir sum dømi, at teir, sum komu umborð á minusveiparan "Møn" í januar, hava bara verið tveir dagar í sjónum síðani. Hinar dagarnar hava teir annaðhvørt hildið heima frí ella gingið og malið á flotastøðini.

Men tað er ikki bara sjóverjan, sum hevur hendan trupulleikan. Í herinum hava menn heldur ikki nóg mikið at gera, og ein frágreiðing er sambært Jyllandspostinum umfatandi sparingar, sum hava havt við sær, at hermenninir venja munandi minni nú enn fyrr. Svend Aage Jensby, verjumálaráðharri, hevur nú biðið herleiðsluna um eina frágreiðing um viðurskiftini.

## Eiga at gevast við stuðlinum

Fíggjarnevndin hjá grønlendska Landstinginum mælir nú til at steðga stuðlinum til fiskivinnumál, sum ikki bera seg.

Nevndin hevur júst góðkent eitt uppskot frá landsstýrinum um at veita rækjumonnum avreiðingarstuðul, og at oljustuðul eisini skal gjaldast hetta til 30. september. Men nevndin heldur seg ikki hava fingið nóg góða grundgeving fyri, at stuðulin yvirhøvur eigur at verða latin. Niðurstøðan hjá fíggjarnevndini er, at stuðulin eigur at steðga nú, tí tað er ikki samfelagsbúskaparliga ráðiligt at lata landskassan stuðla fiskiskapi, sum ikki ber seg.

Tí hevur nevndin nú mælt landsstýrinum til at leggja fram eitt uppskot um eina rationella fiskivinnu, sum ikki skal hava tørv á almennum stuðuli.

## NASA vil hava Svalbard

Amerikanska rúmdarumsitingin heldur ymisk viðurskifti á Svalbard vera so lík viðurskiftunum á gongustjørnuni Mars, at hon umhugsar nú at royna sína út gerð har og at nýta Svalbard sum venjingarstøð hjá komandi rúmdarmonnum.

Herfyri var ovastin í NASA, Sean OKeefe, á Svalbard og hugdi at umstøðunum, og í summar skulu fjúrtan amerikanskir og norskir granskarar kanna yvisk viðurskifti og royna ymsa útgerð á Svalbard. Ein av teimum norsku granskarunum, Hans Amundsen, sigur við Aftenposten, at á Svalbard eru gosfjøll, heitar keldur og ísur, og hetta minnir nógv um viðurskiftini á Mars, sigur hann.

Amerikanarar hava gjørt av ar senda eitt rúmdarfar til Mars við nøkrum sera framkomnum tólum, sum skulu kanna gongustjørnuna, men ætlandi verður farið ikki sent avstað fyrr enn í 2009